**MOTOROLA-TELEFON**
Motorola MCR 4800 XL ynskist (bara hornið, er eisini o.k.).
*Tlf. 219153*

**JØRÐ Í SØRVÁGI**
Um hóskandi boð fæst, verður ein trøð í Sørvági seld. Trøðin er 15.791 fermetrar uml. 1/3 er dyrkaður. Áhugað kunnu ringja og spyrja eftir Rosu.
*Tlf. 332650*

**TIL SØLU**
Dekodari til Canal digital við kápuli kr. 950,00. Parabolhøvd kr. 250,00
*Ring 312077/229454*

**TIL SØLU**
Nokia 6610 við datakápuli kr. 1.900,- Nokia 8310 kr. 1.500,-
*Ring 312077/224944*

**TRAPPA**
Vælhildin bein trappa úr furu til sølu.
*Tlf. 441218*

**NOKIA TIL SØLU**
Ein sera góð Nokia 3310 við ladara til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 258411*

**KODAK MC3**
Kodak MC3 digitalt mynda- og videotól, við TFT skermi, spælir eisini MP3 fílir, við í keypinum er eitt 16 og eitt 48Mb Compact Flash kort. Verður sett til telduna við dokingstation ígjøgnum USB. Komplett sett klárt at nýta. Prísur 2.200,- krónur.
*Tlf. 258411*

**FLØSKUINNSAVNAN, TÓRSHAVN**
8., 9. og 10. januar fara vit undir innsavnan av fløskum. Ágóðin fer til 16 ára gl. leikarar, ið koma at luttaka í Dronninglund Cup hondbóltskappingini í summar. Vit koma eftir arbeiðstíð. Takk fyri. Gott nýggjár.
*H71-stuðlar*

**KUN 1300 TIL KASTRUP**
Hjælp mig gennem lufthavnen, først í februar, da jeg næsten er blind. Ring hurtigt
*28708411, Sonja*

**SIEMENS C45**
fartelefon við øllum til sølu.
*Tlf. 756757*

**ERICSSON T65 TIL SØLU**
Lítið brúkt fartelefon til sølu vegna keyp av nýggjari. Nýprísur 1.300,- til sølu fyri bert 500,-
*Tlf. 513264*

**PINNABRENNI**
Vit hava pinnabrenni at selja 20 kr. sekkurin.
*Verkhúsið Stíggjur tlf. 448944, Saltangará*

**YNSKIST**
Uppsamlingsbrunnur ynskist til keyps.
*Tlf. 251450*

**BLANDINGSBATTARÍ**
til sølu fyri 350 kr. 1 par spildurnýggir arbeiðsskógvar nr. 43 við stálfronti til sølu fyri 200 kr. 75 tlf. kort til sølu.
*Tlf. 270427*

**TIL SØLU**
Radio, vekkari til sølu fyri 50 kr.
*Tlf. 269909*

**TIL SØLU**
3 tráðleysar ISDN- telefonir av slagnum Eurit 133 v/ 1 stk basa til sølu fyri 1.000 kr. 2 ISDN Modem av slagnum Lasat og eicon diva til sølu fyri 200 kr stk.
*Tlf. 251819, Hans*

**FARTELEFON**
SMS Chatboard óbrúkt til Nokia 51xx og 61xx model. Góð til m.a. sms, telefonbók v.m. fyri 150 kr. (+frakt)
*Tlf. 0045 86428627/ 0045 26747474 (eisini sms)*

**FARTELEFON**
Uppladari til Ericsson 626 óbrúkt við antennu til sølu fyri 100 kr. (+ frakt).
*Tlf. 0045 86428627/ 0045 26747474 (eisini sms)*

## VALGREINAR

# Medisin til alivinnuna

**Bergur P. Dam,**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðustreymoy*
*– tað sterka C'ið*



**Tað ber til at bøta um støðuna hjá alivinnuni uttan at veita studning. Men samstundis krevst strategisk nýhugsan.**

Marknaðurin fyri alifisk er í støðugari broyting. Nýggj lond koma sær fram á marknaðunum og vit kunnu rokna við at hereftir verður prísurin á alifiski undir støðugum trýsti. Hetta eru lond við nógvar ferðir størri framleiðsluorku enn okkara. Og nøkur av hesum eru menningarlond, við livistøði, sum vit ikki hava kent í meira enn hálva øld. Slík hópframleiðsla fer at gera tað alt meira trupult hjá føroyingum at kappast um standardvørur.

Omaná trongda marknaðin er alivinnan eisini illa rakt av sjúkum - serliga ILA hevur verið ein sonn plága.

Úrslitið er, at alivinnan í løtuni er mestsum uppsteðgað. Eginkapitalurin er burtur og fíggingarmøguleikarnir eru so at siga úttømdir. Kapitaltrotið er ovurstórt, men í Føroyum er ikki nóg mikið av íleggjarum, ið vilja vága kapital í alivinnuni.

**Útlendskan kapital inn**
Vit mugu ásanna, at í einum marknaðarbúskapi er kapitalurin internationalur. Hvørt íleggjarin er føroyskur ella útlendskur, er - sæð frá einum marknaðarbúskaparligum sjónarhorni - líkamikið.

Samfelagið má so fáa sín ágóða á annan hátt - við skattum og loyvisgjøldum.

Tí verður neyðugt at taka burtur, ella linka, forðingarnar fyri útlendska ognarpartinum í alivinnuni.

Samstundis verður neyðugt at knýta treytir um brúksskyldu at aliloyvinum, soleiðis at tað ikki ber til at keypa upp føroysk alibrúk, bert fyri at leggja tey niður aftur av kappingarávum.

**Vistfrøðilig burðardygd**
Ongin ivast longur í, at stóru orðini um útflutningsnøgdir í 100 túsund tonsa tali eru órealistisk. Mong vísa á, at ein av orsakunum fyri mongu sjúkutilburðunum í alivinnuni júst er, at roynt hevur verið at ala ov nógv á ov lítlum øki.

Og tá skotið verður upp at medisinera seg burtur úr øllum alisjúkunum, tá hevur man av sonnum sett spakan í jarðingina av føroyskari aling. Tí tá hevur man eisini boða frá, at føroyskur alifiskur er vánavøra, sum bert kann seljast fyri vánaprís.

Ongin ivi er um, at gongdin á marknaðunum er so, at brúkarin ikki vil gjalda høgan prís fyri fisk, sum er aldur við stressi og sum er fyltur við heilivági. Tí áttu vit at broytt hugburð um aling í Føroyum. Skal føroysk alivinna yvirliva longi, mugu vit leggja okkum eftir smærri nøgdum ið kunnu seljast fyri høgan prís, tí fiskurin er aldur í bestu umstøðum og uttan heilivág - og sum frálíður eigur hann at kunna seljast við vøruheitinum »Vistfrøðilig aling«.

Ein uppgáva hjá politisku skipanini verður at leggja til rættis eina strategi fyri slíkari umlegging av føroyskari alivinnu.

Tá verða aftur útlit fyri eini tryggari, inntøkuskapandi alivinnu í Føroyum.

# Kvinnan skal ráða yvir sínum egna kroppi

**Elin Tausen,**
*valevni Miðflokksins í Suðurstreymi*
*Formaður í UFM*



Hendan útsøgnin hevur nú verið at hoyrt av nógvum varrum, bæði kvinnuligum og mannligum, tó seinnast frá Finnleifi Guttesen. Sjálvandi skal kvinnan ráða yvir sínum egna kroppi, á samma hátt sum maðurin ræður yvir sínum. Tað kann eingin annar uttan vit sjálvi taka avgerðir viðvíkjandi okkum sjálvum.

Men hvør hevur avgerðarrættin tá tað kemur til ófødda barnið? Mamman, pápin, læknin, politikarin ella er tað barnið sjálvt? Tað er kanska torført at avgera, men fyri meg er ongin ivi um at lóggávan eigur at verja ófødda barnið, sjálvt um tað enn er inni í móðurlívið. Lat meg útgreina hví:

Longu í 4 viku eftir at barnið er gitið, byrjar eitt lítið rørformahjarta at sláa, barnið hevur longu fingið sítt egna blóðrensl og sína egnu blóðtypu, hóast tað bert er 7 mm langt.

Tá barnið er um 8 vikur hevur tað armar, bein, heilin er byrjaður at dannast, organirnar eru dannaði og barnið byrjar at røra seg. (Kelda: www.rettentilliv.dk/miraklet.htm)

Eg kundi hildið áfram, men eg vil bert hava endamálið fram, at vit her tosa um eitt livandi menniskja, og ikki ein likamslut av mammuni. Hetta lítla menniskja er líka nógv ein partur av pápanum, sum av mammuni, hóast tað er hon sum ber tað í 9 mánaðir.

Tá tað kemur til spurningin um at skal kvinnan ráða yvir sínum egna kroppi, er svarið sjálvandi, JA. Men tá tað kemur til rættin at liva, er tað ongin uttan, Hann, sum hevur mynda okkum í móðurlívið, sum avgerð hvussu long okkara lívsleið skal verða.

At ráða gevur eisni eina ábyrgd. Kvinnan hevur ábyrgd yvir sínum egna kroppi, og eisini ábyrgdina av avleiðingunum av sínum egna valið. At hava kynsligt samband gevur eisini eina ábyrgd yvirfyri tí lívi, sum kann spyrjast burturúr. Vit mugu øll taka ábyrgd av teimum avleiðingum, sum standast av okkara egnu avgerðum, sjálvt um tað ikki bleiv sum vit høvdu ætla. Vit kunnu ikki renna frá ábyrgd.

Vit skulu innrætta okkara samfelag, soleiðis at tað altíð skal vera hjálp og vegleiðing at finna til tey foreldur, sum ikki síggja seg føran fyri at taka ábyrgd av einum barnið. Eitt barn er altíð eitt av lívsins stóru undrum, og tí skal øll lóggáva verða gjørd til at verja børnini.

Forkvinnan í Javnstøðunevndini úttalaði seg soleiðis fyri stuttari tíð síðani í Útvarpið Føroya, at tað er ongin lóg í Føroyum sum verjir børnini, men har fer hon skeiv. Fosturtøkulógin verjir júst ófødda barnið, og er hetta eitt gott útgangspunkt at hava, til at fara í holt við aðrar barnavinarligar lógir.

Miðflokkurin ynskir at verða ein rødd á tingið fyri tey í onga rødd hava enn.

Gev okkum tína atkvøðu 20. Januar. Setið X við lista H.

# Eg vil búgva í einum vælferðarsamfelag

**Malan Johansen,**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Tú kann meta um eitt vælferðarsamfelag, við at hyggja at, hvussu samfelagið fer við teimum veikastu. Føroyingar hava eitt rímuliga gott vælferðarsamfelag, men tað er ikki nóg gott. Til dømis eru fleiri sinnisveik fastløst á sjúkrahúsinum, tí tey einki stað hava at búgva. Tað er ov vánaligt og kann als ikki góðtakast. Vælferðarsamfelagið, sum eg síggi tað, hevur størstu virðing fyri øllum samfelagsbólkum.

**Skulu handla**
Í nógvum førum kenna vit loysnirnar á trupulleikunum, tí álit eru skrivað. Nú er tíðin komin at handla. Ein ætlan eigur beinanvegin at verða gjørd saman við fakfólkunum á økinum. Tey stig, sum skulu takast næstu árini, skulu raðfestast, soleiðis at tørvuin á hesum økjum verður nøktaður. Peningur skal síðani játtast út frá hesari ætlan, soleiðis at vit røkka málinum.

**Skipað samfelag**
Treytin fyri at vit kunnu játta penging á fíggjarlógini til hesi øki er, at vit skipa samfelagið so væl sum gjørligt. Tað merkir millum annað, at tann almenna umsitingin skal vera so einføld og løtt at umsita sum møguligt. Og tað merkir at vinnan skal hava best møguligar umstøður at virka undir. Tað er vinnan sum skapar framburðin í samfelagnum, og eru karmarnir teir bestu, verður framburðurin størstur. Tá hava vit eisini penging til at tryggja vælferðarsamfelagið.

Set kross við lista D



## HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 26. juli 2003. Somuleiðis ynskja vit øllum eitt gott nýggjár.
**Leona og Kári Nilssen**



Foreldur míni og eg takka hjartaliga øllum tykkum, sum við hjálpsemi, vitjanum, gávum og á annan hátt gleddu meg á konfirmatiónsdegi mínum 5. okt. 2003. Við ynskjum um eitt av Harranum signað nýggjár.
**Irena Áarberg Joensen, Tórshavn**



Tykkum, sum við vitjan, telegrammum, gávum og á annan hátt gleddu meg og foreldur míni á fermingardegi mínum tann 12. okt. 2003, takki eg hjartaliga. Eisini ein tøkk til tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til henda degin. Við ynskjum um eitt gott nýggjár.
**Leivur Samuelsen, Bjarnoyarvegi 15, Tórshavn**



**Góði, fitti babba!**
Hjartaliga tillukku við degnum 28. des. Takk fyri at tú ert so góður við meg. Eg elski teg. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan Rakul xxx**



**Góða, fitta didde!**
Eise meg elke teg.
**xxx lítlibeiggi**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga fyri vitjan, gávur, heilsanir og alla hjálpina á konfirmatiónsdegnum 5. okt. Eitt eydnuberandi nýggjár ynskja vit tykkum.
**Sofus Foldbo**



**Góða Malan**
Vit ynskja tær tillukku við 25 ára føðingardegnum.
**Gita hvør**



**Góði Johnny**
Hjartaliga tillukku við degnum 10. januar. Alt tað besta í framtíðni ynskja
**Simona, Árni og mamma**



**Góða, elskaða Tóra!**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Alt tað allarbesta og Guds signing ynskja vit tær. Vit elska teg.
**Teitur, babba og mamma**



**Góðu Emy og Ingi**
Hjartaliga tillukku við 12 ára døgunum ynskja
**omma og abbi**

**Til okkara elskaðu Pavlu**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum í dag. Eisini ein seinkað føðingardagsheilsan til Anniku og Jens. Jesus pápi signi tykkum. Tær kærastu heilsanir frá
**mammu og babba**





**Góða diddan**
Hjartaliga tillukku við 50 ára føðingardegnum 9. jan. Við vón um ein góðan dag og 50 deilig ár afturat.
**Heilsan ein av systrunum á Kinn**



Ein dugnaligur trummusláari á Argjum fylti 20 ár sunnudagin 4. jan. Myndin er tikin í mars 1985. Helst eru tað arvaeginleikarnir frá pápanum, sum so tíðliga gjørdu vart við seg. Hjartaliga tillukku.
**Omma**



**Góða fitta Sólvá**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 5. jan. Jesus pápi signi framtíð tína
**Bestu heilsanir Heidi, Angela, lítli beiggi, babba og mamma**



**Góðu Emy og Ingi**
Hjartaliga tillukku við 12 ára døgunum 10. januar ynskja
**mamma og Niggi**



**Góða, elskaða mamma**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Vit elska teg. Takk fyri alt, sum tú ert fyri okkum. Allarbestu ynskir frá
**Beintu og Boga**



**Góði elskaði lítlibeiggi**
Hjartaliga tillukku við eitt ára degnum 9. januar. Jesuspápi signi framtíð tína. Vit elska teg. Bestu heilsanir frá
**Diddu, Jóhannus og Frits**



**Góði Jóanis**
Hjartaliga tillukku við eitt ára degnum 9. januar. Tað er so deiligt at hava teg at spæla við. Eg eri so góður við teg.
**Heilsan Gunnar**